# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Anestesisjúkrarøktarfrøðingur

Vit søkja eftir anestesisjúkrarøktarfrøðingi til Anestesideildina til setan 1. novembur 2007 til og við 31. august 2008. Talan er um eitt tíðaravmarkað starv, fulla tíð við tilkallivakt.

Vit skulu í nakrar mánaðir ansa sjúklingum í viðrakning í dagtímunum, tí verður deildin uppnormerað við einum tíðaravmarkaðum starvi.
Arbeiðið á anestesideildini fevnir í høvuðsheitum um at doyva sjúklingar til skurðviðgerðir innan allar sergreinir, sum eru: ortopædi, gyn./obst., alm.kir., urologi, plastikkir., oyrna/nasa og háls, tannviðg., o.a. Vit geva aðrar anestesiveitingar til allar deildir á Landssjúkrahúsinum og eru við, tá bráfeingis sjúkraflutningur er.

**Førleikakrøv:**
Prógv og góðkenning sum anestesisjúkrarøktarfrøðingur.
Vit sóknast eftir einum starvsfelaga, ið hevur royndir innan anestesiøkið, hevur góð samstarvsevni, kann arbeiða sjálvstøðugt, er framtakshugað/ur og tænastusinnað/ur. Kunnleika til teldu er ein fyrimunur.

**Meira fæst at vita** við at ringja 304500 til Óluvu Lómstein, deildarleiðara, lokal 5757, ollo@lsh.fo ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, naina@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 4. oktober 2007 kl. 12.00

## Starvsfólk til Deild 3

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum/pleygarum til setan 1. oktober 2007 ella eftir nærri avtalu:

· eitt fast starv á starvsbrøki 0,5 í kvøldvaktum.
· eitt farloyvisstarv á starvsbrøki 0,7 til og við 30. september 2008.

Deild 3 er ein opin psykiatrisk viðgerðardeild, ið er í støðugari menning. Vit starvast sum sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsurøktarar í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar.

**Krøv til umsøkjaran**
· prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari/pleygari
· áhuga innan psykiatri
· góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**
· eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
· fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
· positivt tvørfakligt samarbeiði
· góða innleiðslu

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Elsebeth Sørensen, deildarleiðara, lokal 4003, elso@lsh.fo ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 28. september 2007 kl. 12.00

## Kost- og føðsluatstøðaranæmingar til Køkin

Tvey læruupláss sum kost- og føðsluatstøðaranæmingar verða við hesum lýst leys at søkja til setan 1. november 2007 ella eftir avtalu.

Lærutíðin er 3 ár, harav 20-30 vikur og 2 ferðir 15 vikur skúlaskeið á tekniskum skúla í Danmark.

**Skúlakrøv**
· 9. flokks prógv frá fólkaskúlanum

Royndartíð
· royndartíðin er 3 mánaðir

**Førleikakrøv**
· hug til at læra um og framleiða rættan kost til sjúklingar
· ábyrgdarkensla
· góður røkjuskapur
· góð samstarvsevni
· hugflog og dirvi til at koma við nýggjum hugskotum
· klára at arbeiða undir tíðarpressi
· áhugi at arbeiða við teldu

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Ann Askham, næmingavegleiðari.
Kunning um útbúgvingina sæst á heimasíðuni www.ernaerings-assistent.dk.

**Umsóknarfreistin er** 27. september 2007 kl. 12.00.

## Varaleiðari til B7

Vit søkja eftir einum fulltíðar varaleiðara til B7 til setan 1. november 2007 ella eftir avtalu.

B7 er ein nýumvæld medisinsk deild, sum tekur móti elektivum og akuttum vaksnum sjúklingum.
Umvælingar á B6 eru í gongd, og sjúklingar og starvsfólk á B6 eru í løtuni á B7 og á E3/E2.
E3 við sergreinini rehabilitering av apoplexi sjúklingum verður løgd saman við B7.
Faklig menning við undirvísing innan allar sergreinarnar er byrjað, og í oktober verða 3 undirvísingardagar um tvørfakliga rehabilitering av apoplexi sjúklinginum.
Aðrar spennandi avbjóðingar, ið liggja fyri framman, er m.a. í verksetan av THS (Talgild Heilsu Skipan) primo 2008.

**Deildin hevur vanliga pláss fyri 15 sjúklingum og fer at hava hesar sergreinar**
· apoplexi
· lungamedisin
· nefrologi
· rheumatologi
· onkologi

Arbeisðuppgávur í høvuðsheitum
· faklig menning av deildini saman við deildarleiðara
· virkandi leiðari, tá deildarleiðarin er burturstødd
· ábyrgd av lesandi
· verða við í kliniskum røktini

**Krøv til umsøkjaran**
· prógv og góðkenning sum sjúkrarøktar frøðingur
· áhuga í leiðslu
· áhuga í fakligari menning av starvsfólkum
· hollan fakligan førleika innan medisinsku sjúkrarøktina
· góð tvørfaklig samstarvsevni
· sjálvstøðug/ur, kreativ/ur og hava visionir
· teldukunnleika

**Vit kunnu bjóða**
· innleiðslu
· fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
· positivt tvørfakligt samarbeiði
· ávirkan á fakliga menning
· eitt dynamiskt og fjøllbroytt arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum

**Fyrimunir** hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.

**Starvslýsing og meira fæst at vita** við at ringja 304500 til Jónu Augustinussen, deildarleiðara á B7, lokal 6067 lsjonau@lsh.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, asap@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 1. oktober 2007 kl. 12.00

## Heilsuhjálparar, heilsurøktarar, sjúkrahjálparar ella sjúkrarøktarfrøðingar til E3/E2

Á E3/E2 eru 5 størv í skiftandi vaktum leys at søkja til setan 1. november 2007 ella eftir avtalu til og við 31. desember 2008.
Vit søkja røktarstarvsfólk á starvsbrøki 0,8 við møguleika fyri hægri ella lægri brøki.
Vit kunnu eisini tosa um, hvat slag av vaktum tú trívist best við.

Umleggingar og umvælingar eru á medisinska deplinum.
E3 verður flutt saman við B7, seinast januar 2008.
Búfólk á E2 verða flutt á aðrar stovnar seinast 31. desember 2008.

E3 er ein medisinsk deild við 9 seingjaplássum. Fakliga sergreinin á deildini er uppvenjing av sjúklingum við apopleksia cerebri. Arbeitt verður í tøttum tvørfakligum samstarvi við m.a. fysioterapeutar, ergoterapeutar, talupedagog og læknar. Dentur verður lagdur á gott samstarv við avvarðandi og við primertænastuna.

E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri búfólkum.Vit ynskja starvsfelagar við áhuga og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

**Krøv til umsøkjaran**
· prógv sum heilsuhjálpari, sjúkrahjálpari, heilsurøktari ella sjúkrarøktarfrøðingur við góðkendari autorisation
· góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
· fakligan áhuga innan sergreinirnar

**Vit kunnu bjóða**
· eitt fjølbroytt og vinarligt arbeiðs umhvørvi
· fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
· positivt tvørfakligt samstarv
· fakliga menning
· innleiðslu

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Monicu Brickman, deildarleiðara á E3/E2, lokal 6012, ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102.

**Umsóknarfreistin er** 1. oktober 2007 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

· er sjúklingurin í miðdeplinum
· eru umleið 200 seingjarpláss
· eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
· eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
· eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
· er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo